# R VERÐUR FORBOÐIÐ

Grønlands eftir okkum.

Tey eru limir í Norðuratlantiska felagsskapinum fyri súgdjór, Nammco, saman við okkum.

– Vit kunnu bara halda fram at drepa grind við at granska grind, er niðurstøðan hjá lívfrøðinginum.

Hann sigur, at eisini í Nammco eru tey farin at spyrja eftir vísindaliga grundarlagnum undir grindadrápi.

Hann staðfestir, at kunnu vit ikki vísa á, hvussu stórur grindastovnurin er, hvussu grindin ferðast, hvar hon ferðast, skulu vit gloyma alt um at sleppa at drepa grind um nøkur ár.

## Sleppa vit ikki at granska grind, skulu vit gloyma alt um at sleppa at drepa grind

– Vit noyðast at hava haldgóðar grundgevingar fyri at kunna halda fram við grindadrápinum.

– Vit kunnu ikki dúva upp á okkara søguligu rættindi upp á tað, at hagtølini vísa, at okkara grindadráp ikki nerva stovnin.

Hann sigur, at vit vita nakað um støddina á stovninum um útreiðslu og annað.

– Men vit kundi hugsað okkum at fingið meiri vitan til vega, eisini um nøring fyri at kunna meta neyvari um tilgongdina til stovnin, og um onnur viðurskifti eisini.

### Burðardygg veiða

Bjarni Mikkelsen skoytir upp í at í hesum tíðum, har krøvini um burðarygga veiði alsamt herðast, fer kravið um burðardygt grindadráp eisini at herðast og tá mugu vit kunna prógva vísindaliga, at talan veruliga er um burðardygga veiði.

– Tað mátti verið frægari at verið til reiðar við teimum røttu prógvunum, tá ið krøvini stinga seg, leggur hann afturat.

*aki@sosialurin.fo*

## Tað mátti verið frægari at havt prógvini til reiðar, tá ið krøvini koma

## Vit mugu sleppa at granska fyri at kunna prógva, at vit veiða burðardygt

# Kvota kann verða sett á grindadráp

**GRIND OG GRANSKING** Holl vitan er grundarlagið undir grindadrápið og stórhvalaveiði.

Áki Bertholdsen

**Ein holl vitan um stovnin er grundarlagið fyri at grindadrápi og stórhvalaveiði.**

**Tað staðfestir Bjarni Mikkelsen, lívfrøðingur á Náttúrugripasavninum.**

**Hann sigur, fyri at veiða grind og stórhval burðardygt, hevur tað stóran týdnin at vita hvussu stórir stovnarnir eru.**

**– Tað hevur stóran týdning at vita, um talan eru um lokalar stovnar, sum eru rundan um Føroyar, ella um talan er um stórar felagsstovnar.**

**– Vit kunnu samanbera tað við haruveiði. Tað ber ikki til at siga, at vit hava eitt ávíst tal av haru í øllum Føroyum og tí ber til at veiða eitt ávíst tal av haru í Skúvoy. Útgangsstøðið fyri haruveiðina í Skúvoy má sjálvandi talið á haru í oynni og ikki, hvussu nógv hara er alla aðrastaðni.**

**Bjarni Mikkelsen sigur, at sama ger seg galdandi fyri grind. Er talan um ein stovn, sum bara heldur til rundan um Føroyar, fær tað stóra ávirkan á veiðina.**

**– So kann tað henda, at kvota verður sett á grindadráp, leggur hann afturat.**

**Hann leggur kortini afturat, at veiðihagtølini vísa, at ongin tekin eru um, at stovnurin er í minking.**

**Men tað sama ger seg galdandi fyri stórhvalaveiði,**

**– Skulu vit gera okkum vónir um at sleppa at veiða stórhval, mugu vit vita, hvussu stovnurin er og, hvussu hann ferðast.**

**– Er talan um ein meiri ella minni lokalan stovn, er tað greitt, at vit kunnu aldrin veiða stórhval, uttan at eyðræna stovnin.**

**– Men kunnu vit prógva vísindaliga, at talan er um ein felagsstovn, sum ferðast víða, er støðan ein heilt onnur, sigur hann.**

*aki@sosialurin.fo*

# Hava verið til reiðar í 11 ár

**GRIND OG GRANSKING** Tað gongur illa at sleppa framat at merkja grind, tí vit eru í harðari kapping kaggarnar og grýturnar, sigur Bjarni Mikkelsen, lívfrøðingur

Áki Bertholdsen

Hóast tað hevur alstóran týdning at granska grind og grindadráp, gongur ómetaliga illa at fáa loyvi til tað.

Tað sigur Bjarni Mikkelsen, lívfrøðingur á Náttúrugripasavninum.

Hann sigur, at í heili 11 ár hava tey verið til reiðar við sendarum at merkja grind, men tað hevur bara eydnast tvær ferðir at merkja nakrar hvalir.

Tað var í 2000, tá ið fýra hvalir vórðu merkir og í 2004, tá ið seks hvalir vórðu merktir.

Báðu ferðina var tað í Vágum, har sýslumaðurin sum tá var, Regin Jespersen, vísti stóra vælvild og stórt forstáilsi fyri tí vísindaliga arbeiðnum.

Bjarni Mikkelsen harmast um, at tey aðrastaðni í landinum ikki hava víst somu vælviwld og nettupp tann manglandi vælvildin hevur elvt til, at tað ber næstan ikki til at fáa eina grind at merkja.

### Bíða í 11 ár

Men síðani 2000 hava vit hvørt ár gjørt vart við, at vit kundu hugsað okkum at sloppaið framat eini grind, sum kundi verðið merkt til vísindalig endamál og so slept avstað aftur.

Kortini viðgongur lívfrøðingurin, at tað hevur gingið illa at fingið undirtøku fyri hesum.

– Vit eru í harðari kapping við lakaíløt og grýturnar, tí hvørja ferð, ein grind er, skal hon drepast.

Tað vísir seg eisini, at hóast nógv grind hevur verið í einum øki, ber ikki til at fáa eina grind at merkja, tí tær skulu altíð drepast.

Men tað er næstan ein andsøgn, tá ið hann sigur, at hóast tað vísir seg at vera tórført at fáa eina grind at merkja, vísir tað seg, at tá ið nakrir hvalir so eru merktir, er øguliga stórur áhugi fyri úrslitinum.

### Tíggjund til vísindini

Hann sigur, at tey hava ikki lagt í at gingið á myndugleikarnar um at áleggja grindamonnum at avlevera eina grind til vísindalig endamál.

- Tað nyttar helst ikki nógv hjá okkum at brúka makt fyri at fáa eina grind. Vit vilja helst gera tað við vælvild frá fólki, so at tey við góðum huga hjálpa okkum at reka og merkja, sigur hann.

Hinvegin heldur hann eisini, at politiski áhugin er lítil fyri at merkja grind, sum kann vera við til at tryggja, at vit sleppa at varðveita grindadráp.

- Tað er ongin politikari, sum tekur tað upp á tungna, leggur hann afturat.

Tað hevði eisini tænt okkum, um vit seldu 10. hvønn hval til frama fyri granskingina, leggur hann afturat.

*aki@sosialurin.fo*